# At vera til TAKS

KÁRI Á RÓGVI
løgtingsmaður Sjálvstýrisfloksins



**Sjálvstýrisflokkurin royndi fyri ári síðani at fáa Føroya Løgting at samtykkja at steðga fyrningini av krøvum móti TAKS fyri óheimilað krav av meirvirðisgjaldi. Til fánýtis.**

Uppskot okkara tók ikki støðu til sjálvan undirliggjandi spurningin, hvørt heimild var at krevja meirvirðisgjald av skrásetingargjaldi. Eftir okkara valdsbýtisskipan hevur løgtingið sagt sítt, tá ið lógin er samtykt, síðani eiga dómtólar at rætta lógina og siga fólkinum, hvussu lógin skal skiljast – ikki minst tá ið talan er um fleiri lógir, ið samvirka.

Vit hava stóra samkenslu við teimum, ið skulu umsita løgtingsins lógir. Vandamálini eru nógv. Vit hava lóg um meirvirðisgjald, sum skal virka saman við lóg um skrásetingargjald, sum aftur skulu virka saman við fyrningarlóg, fyrisitingarlóg og ymsum óskrivaðum grundreglum. Greitt er, at skilafólk kunnu hava ymsar áskoðanir um endaligu rættarstøðuna. Tí er ikki vist nakað forgjørt í, at TAKS førir rættarmál um ta almennu tulkingina og landskassans vegna lýsir málið av eins lystum.

Men! Har er eitt men. Var skil á í landinum, so boðaði landsstýrismaðurin í fíggjarmálum frá, at hann hevði góðkent, at hetta var prinsippmál vert at føra – og at tá ið endaliga niðurstøðan fyrilá fingu øll somu viðferð. Sum skrivað stendur í fyrningarlógini, so kanst tú vera í “utilregnelig Uvidenhed om sit Krav” – tvs. ikki vita av, at onkur skyldar tær pengar – tá eigur fyrning ikki at roknast, fyrrenn tú “ved sædvanlig Agtpaagivenhed vilde have været i Stand til at kræve sit Krav betalt.” Palliba hevur ringt við at taka dagar ímillum heimildir hjá landinum – og eigur tí fáa longri boð.

Eisini átti verið nóg mikið at kært heldur enn at stevnt.

Var nakað skil á, so gjørdi landsstýrismaðurin greitt, at fyrningin ikki varð roknað fyrrenn óvissan um heimildina kom alment fram. Somuleiðis skuldi landsstýrismaðurin gjørt greitt, at í teimum førum, tá ið landskassin hevur fingið sítt og bilsølan antin er avtikin, ella bilurin fluttur inn beinleiðis, ber til at fara beint til TAKS. Hetta er longu staðfest í kærunevndaravgerðum (aftur og aftur), men landið vil ikki boyggja seg fyri kæruskipanini – heldur ikki boða frá, at kærdar avgerðir avbróta fyrningina.

**Class Action**

Okkum tørvar í Føroyum ábøtur á bæði lógarverk og fyrisiting. Í øðrum londum er vanligt, at til ber at stevna vegna ein hóp (‘klassa’) av fólki. Hetta merkir, at tú við einari og somu stevning kundi stevnt vegna øll tey í ávísari støðu – til dømis øll ið vóru kravd eftir mvg av skrásetingargjaldi í ávísum tíðarskeiði. Hetta hevði so merkt, at fyrning varð avbrotin fyri allan hópin í senn. Fyrimunurin er, at tann ið tekur stríðið fær lønina, tí manggan er veruliga stríðið alt av tí eina prinsippmálinum, meðan øll hini bert eru avgreiðslumál. Serliga tá ið landsstýrið ikki vil melda út, er neyðugt at fáa slíka áseting inn í rættargangslóg okkara. Umframt hetta manglar eisini dagføring av fyrningarlógini – danir fingu nýggja í 2007 – okkara er frá 1908.

Men sjálvandi er ongin skipan betri enn tey, ið umsita hana. Vit bóðu í 2008 løgtingið atkvøða um ikki at fyrna “krøv um endurrindan av meirvirðisgjaldið, ið av órøttum er roknað og kravt av skrásetingargjaldi.” Men vit fingu bert tvær blankar atkvøður frá hinum – øll onnur tingfólk vóru ímóti at javnseta landsins borgarar, herundir Rodmund Nielsen – sum nú hevur vunnið prinsippmálið og fær mvg’ið afturgoldið.

# Oman fyri orðini liggur listin

INGER SMÆRUP SØRENSEN



Tað er púra vanligt og í fínasta lagi, at eitt listasavn fær atfinningar.

Innan listaumhvørvið er ein røð av einstaklingum við sera sterkum meiningum um, hvussu listin skal stýrast, passast og pleygast og ringt er at ímynda sær eina beinleiðis semju millum hesir einstaklingar. Um tað í løtuni ikki hómast sátt, semja ella idyllur í sambandi við Listasavn Føroya, hava vit kortini møguleikan fyri einum opnum, livandi og atfinningarsamum kjaki, fakligari fjølbroyttari viðgerð av listini og virðing fyri listasavninum sum stovni.

Fyri at hetta skal bera til krevst, at ikki bara Mentamálaráðið, men politiska skipanin, sum heild, tekur ábyrgd sína fyri listini í álvara. Trupulleikin er, at tað eyðsýniliga eru ymsar meiningar um politiska skipanin yvirhøvur hevur ábyrgd fyri tjóðsavni okkara. Í eini samrøðu við Sosialin tann 16.desember sigur, Helgi Fossádal, savnsleiðari, at Listasavn Føroya ræður sær sjálvum. Listasavnið er sjálvsognarstovnur og tessvegna kann eingin, hvørki mentamálaráðharrin, ella nakar annar blanda seg í, hvussu Listasavn Føroya verður stýrt.

Men er tað soleiðis?

Fyri tað fyrsta er tað landið, ið fíggjar Listasavn Føroya við umleið 2,5 milliónum krónum um árið og í øðrum lagi var tað upprunaliga eitt krav frá Mentamálaráðnum, at ráðið skuldi góðkenna viðtøkurnar hjá Listasavninum, tá hesar vórðu orðaðar, eins og ráðið tilskilaði sær rættin at velja stýrisformann Listasavnsins fyri á henda hátt at hava alment eftirlit við almennum pengum.

Viðtøkurnar hjá Listasavninum eru altso politiskt konfirmeraðar og hevur politiska skipanin fremstu ábyrgdina fyri Listasavni Føroya. Tað má vera ein politisk ábyrgd at tryggja, at listasavnið verður rikið sum eitt tjóðsavn og ikki sum ein sjálvsognarstovnur.

Um okkara politikarar eisini halda, at Listasavnið ræður sær sjálvum, haldi eg hetta vera eina misskiljing. Tá landsstýriskvinnan í mentamálum velur ein av sínum egnu hægstu embætisfólkum sum stýrisformann, sleppur landstýriskvinnan armslongdarprinsippinum, og velur at taka á seg beinleiðis ábyrgd fyri Listasavni Føroya.

Um tað er rætt ella skeivt í verandi støðu at minka um fjarstøðuna millum listasavnið og mentamálaráðið kann vera trupult at siga. Men støðan er soleiðis í løtuni. Tí mugu vit vænta okkum, at í hvussu so er landsstýriskvinnan í mentamálum er vælvitandi um, hvussu Listasavnið verður rikið. Vit mugu eisini vænta okkum visjónir um, hvussu okkara tjóðsavn skal rekast fakliga forsvarligt og í tráð við altjóða reglur fyri listasøvn. Hetta eru visjónir, sum mangla hjá øllum politiskum flokkum.

Hóast vegurin til sátt og semju kanska ikki er tryggjaður, átti vegurin til at útinna sínar samfelagsuppgávur ligið opin fyri okkara tjóðlistasavn. Landsstýriskvinnan í mentamálum – eins og aðrir politikarar mugu altso átaka sær sína ábyrgd fyri tí, sum liggur langt omanfyri ósemjur og sonevnt gamalt klandur - nevnliga listini sjálvari.

# Aksel í neoliberalistiskari skuggaboksing

TÓRBJØRN JACOBSEN



Nú ivist eg onga løtu í, at Aksel Vilhelmsson av heilum huga, hjarta og sál er ein vælmeinandi ástøðiligur sosialdemokratur. Men, at tað er farið at mala fyri honum í heilsutrygdarmálinum, er ongin ivi um. Kanska er hann komin sær í ringan politiskan vertskap ella hevur persónligi dráttsurin um val til parlamentið bara roytt staðsetingina av nýggja stovninum í Klaksvík burtur frá substansinum í málinum, sum er ein grundleggjandi trygdarskipan á heilsuøkinum. Hendan skal sjálvandi fíggjast, annars stendur alt í hálvum gekki og meiri enn tað. Aksel veit betri enn nakar, at heilsutrygdin – øll skipanin, sum sjúkrakassarnir hava røkt so fyrimyndarliga – hongur í leysum lofti, mest av øllum tí, at politiska fyrireikingararbeiðið hjá landsstýrismanninum og landsstýrinum ikki var gjørt til lítar fyri framløguna á tingi.

Lat meg staðfesta einaferð enn, at tað finst ongin fígging til heilsutrygdina eftir 31. desember 2011. Verandi fígging er tá burtur sambært lógini, og ongin ætlan er um, hvør fígging avloysir verandi gjøld til skipanina. Ikki annað enn, at heilsutrygdin eftir tað er givin upp til skutils í partapolitiskum telvingum um diverse fíggjarlógir, har alt lagar seg, alt eftir hvør ið hevur teir politiskt sterkastu yvirarmarnar.

Oddviti løgtingsins í almanna- og heilsumálum, fólkafloksmaðurin Jákup Mikkelsen, gjørdi púra greitt undir aðru viðgerð av málinum, og hetta er skrivað neyvt av eftir røðu hansara: ”Fólkaflokkurin hevur ta áskoðan, at táið hetta gjaldið fellur burtur, so skal tað virka sum ein skattalætti fyri øll tey, sum hava goldið hetta inn, og tá fara tey, sum hava lægst inntøku, at fáa tann størsta skattalættan, og tí meina vit, at hesar 104 milliónirnar skulu ikki takast inn sum ein meirskattur, men tær skulu finnast í reellum sparingum…”

Eina greiðari ábending – ella rættari staðfesting - um, at málið als ikki var heilstoypt, áðrenn tað varð lagt fyri tingið, fært tú ikki. Jákup Mikkelsen staðfestir í hesum brotinum, at tað finst ongin fígging til heilsutrygdina onnur enn hon, sum heilsumálaráðharrin ár fyri ár megnar at stríða seg fram til í ókomnum fíggjarlógargerðum. Fyri Fólkaflokkin snýr málið seg ikki um heilsutrygd, men um ein skattalætta á 104 milliónir krónur, eitt tal, ið samsvarar við inngjaldið í ávikavíst 2010 og 2011. Harvið er Aksel krøktur í asosiala og neoliberala sirkusinum hjá Fólkaflokkinum, og hesum agnhaldinum sleppur hann ikki av aftur, fyrrenn hann velur sær aðrar samstarvspartnarar á politiska leikpallinum. Læran frá valskeiðnum 2004-2008 er somikið fesk, at Aksel átti av øllum at vita, hvat ið hendir, táið Javnaðarflokkurin melur vektleysur, loystur frá hugsjónaðarliga tyngdarmáttinum, í politisku sentrifuguni hjá Óla Breckmann.

Nýggja skipanin er ikki samhaldsføst. Tað veit hvør ísakaldur fascistur og hetta veit ongin betur enn sosialdemokraturin Aksel Vilhelmsson. Nakrir batar eru í útgjaldinum, men at rópa nevskatt, proportionalan skatt, fyri eina solidariska skipan, er greið ábending um, at Aksel longu hevur ligið ov leingi í politiska respiratorinum hjá Fólkaflokkinum. Hetta er annars fyrsta ferðin í nýggjari tíð, at løgtingið lógásetir proportionalan skatt umvegis TAKS, og merkisvert er tað, at ein javnaðarmaður ta ferðina skuldi vera í broddi fylkingar sum ábyrgdarhavari. Annars váttaði landsstýrismaðurin undir viðgerðini, at hann tók undir við uppskotinum hjá Tjóðveldinum, at ið leggja inngjaldið í progressiva skattastigan hjá landinum, undanførslan var tó, at sátt var gjørd í landsstýrinum, m.a. við Fólkaflokkin, og sambært henni skuldi inngjaldið vera proportionalt fram til 31. desember 2011 og eftir tað er ongin inngjaldsskipan galdandi. Tvs., eftir at hetta valskeiðið er runnið.

At leggja alla ábyrgd frá sær viðvíkjandi fíggingini, eftir at tvey ár eru umliðin, sømir seg lítið einum landsstýrismanni. Nú argumentini víkja, sigur hann seg onki hava við fíggingina av heilsutrygdini at gera, tað er eitt mál sum fíggjarmálaráðið má taka sær av. Altso, landsstýrismaðurin, sum broytir eina av mest grundleggjandi skipanum samfelagsins, ið kostar góðar hundrað milliónir krónur at reka, hevur ikki skipað soleiðis fyri, at nøkur fígging finst til skipanina, eftir at álagdi nevskatturin foykist burtur sambært lógini pr. 31. desember 2011. Gáttin millum hesi bæði ráðini mátti nú ikki verið hægri enn so, at formaður Javnaðarfloksins í Alberts Hall og krúnprinsurin í sjúkrahúsblokkinum, í sama flokki, ikki kundu tikið saman hendur, og fingið skil á fíggingarspurninginum í heilsutrygdarmálinum, áðrenn málið varð lagt fyri Føroya løgting og samtykt sum eitt illa paðað krov.

At Aksel Vilhelmsson krøkir yvirskipaða tjóðskaparspurning føroyinga – málið um ríksisveiting og føroysku republikkina - upp í heilsutrygdarmálið sigur alt um hvussu illa sperdur hann er í málinum, og at brynja seg við tvætliretorikkinum hjá Mariusi Dam í hesum álvarsmáli er tekin um fullkomna avmakt. At hann hartil roynir at verja seg við neoliberalari skuggaboksing, vælvandur í politisku gummiselluni hjá Fólkaflokkinum í eitt hálvt ár, ger ikki støðu hansara betri.

Nú ein dagin harpuneraði ein veiðimaður í Isortoq í Grønlandi ein monodon monoceros – ein náhval – sum granskarar halda hevði verið ringur av tannapínu. Alt bendir á, at Aksel Vilhelmsson er illa álopin av politiskari tannapínu í málinum um heilsutrygdina. Táið hann leggur okkum báðar Høgna undir at gykla og villeiða stendur tað í grellari andsøgn til tað, sum vit hava dokumenterað í málinum, og í mun til tað sum stendur skjalafast - fyri ikki at siga naglafast – í almennu dokumentunum, sum landsstýrismaðurin Aksel sjálvur hevur virkað til, borið tinginum og fingið samtykt av einum stórum meiriluta.

Aksel, tú veitst hvar hjálpin er at finna, táið hetta málið skal albøtast. Gott nýggjár annars og takk fyri jólakortið.